

# Í Arktis at bora

Deil:

Jan Müller

21.07.2014 - 10:35

Oljan.fo

Fyrrakvøldið fór boripallurin West Alpha úr Boafjørðinum í Noregi við kós eystur í Karahavið norðan fyri Sibir.

Har skal pallurin gera eina royndarboring fyri amerikanska Exxon Mobil og russiska Rosneft. Boristaðið er eystan fyri oynna Novaja Semlja.

Hetta er fyrstu ferð, at oljufeløg bora har, og umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace hevur funnist hvassliga at ætlanini og hevur hótt við at senda skipið Esperanza at forða pallinum at koma eystur hagar. Tí hevur eitt skip hjá norsku sjóverjuni verið við Boafjørðin teir seinastu dagarnar fyri at halda eygað við, um Greenpeace-skipið skuldi komið hagar.

Greenpeace og West Alpha kenna hvør annan. Í mai tóku fólk hjá Greenpeace seg upp á pallin, sum lá í Ølen í Noregi. Málið var at ávara ímóti oljuleiting í arktiska økinum.

Tveir sleipibátar toga West Alpha, og eitt hjálparskip fylgir við teimum. Tað ger norska sjóverjan eisini, og sambært norskum fjølmiðlum fer sjóverjan at fylgja pallinum, so leingi hann er í norskum sjógvi.